# Føroyingar á oljumessu í Aberdeen



OLJA
*Jan Müller*

Í døgunum 2. til 4. september verður altjóða oljuframsýning og –ráðstevna »Offshore Europe 2003« hildin í Aberdeen. Hetta stóra tiltak verður hildið annaðhvørt ár í Stavanger og Aberdeen. Og eins og undanfarnu árini verða eisini fleiri føroysk virki við á messuni, tó at talið er nógv avmarkað í mun til fyrr. Hetta kemst helst av, at tað enn ikki er gjørt nakað lønandi oljufund á landgrunninum, og av tí sannroynd, at ein møgulig føroysk oljuvinna liggur nakað frammi í tíðini.

Feløgini, ið luttaka á Offshore Europe 2003, eru: Atlantic Airways, Tor Shipping, Beras, Normek, Virkisráðgeving, Thor, Skipafelag Føroya, Vágar Airport, Menningarstovan, Oljumálaráðið og Oljuvinnufelagið.

Vit síggja, at tað eru serliga teir heilt stóru veitararnir og áhugafelag og so myndugleikarnir, sum eru umboðaðir. At mongu smærri virkini, sum fyrr vóru við á oljumessum, ikki eru við er helst væl skiljandi, nú tað vísir seg, at tað neyvan verður borað aftur á landgrunninum fyrr enn um tvey ár. Áhugavert er í hesum sambandi at merkja sær, at føroyski offshorebasin í Runavík er ikki við hesaferð.

Oljumessan er so fyrst og fremst karmur um eina risastóra framsýning, har hundraðtals virki kring allan heim vísa fram sínar vørur og tænastur til oljuvinnuna. Haraftrat verður ráðstevna hildin, har kolvetnisspurningar sum heild verða viðgjørdir.

Á ráðstevnuni verður tað so høvi hjá føroysku umboðunum at vísa fram oljutilgongdina í Føroyum og hvar vit standa, umframt at umboðini hava møguleika at kunna seg við oljutilgongdina í heiminum uttan um okkum.

# Bretar góðan fong í Føroyum



*Mark Holden hitti m.a. umboð fyri bæði Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið, tá hann og ein starvsfelagi vóru í Føroyum og kunnaðu seg um føroyska fiskivinnu*

*Mynd Jan Müller*

FISKIVINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú um dagarnar vitjaðu tveir høgtstandandi embætismenn úr Downing Street í London í Føroyum. Teir hittu umboð fyri føroyska fiskivinnu og var endamálið við ferðini at kunna seg um føroysku fiskivinnuna.

Eftir fundirnar hittu vit annan av bretsku embætismonnunum, Mark Holden. Hann sigur, at teir fingu nógv burtur úr vitjanini.

-Vit royna at skapa eina framtíðar fiskivinnu, sum er burðardygg. Og tí hava vit gjørt av at vitja tær stóru fiskivinnutjóðirnar í heiminum fyri at vita, hvat vit kunnu læra. Fyrsti túrurin er til Føroyar og Ísland, og fara vit seinni at vitja lond sum Noreg, USA, Kanada oo.

Mark Holden sigur, at dagarnir í Føroyum hava verið sera gevandi.

-Vit hava tosað við nógv týðandi og vitandi fólk og hesa vitan fara vit at taka við okkum til Bretlands, tá vit skulu til at gera eina endaliga frágreiðing.

## Tøkk

*Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum*
*á ymiskan hátt gleddu meg á 80 ára degnum.*

*Blíðar heilsanir*

**Betta Niclasen**
**Ellisheimið, Tvøroyri**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá ið góða mamma, systir, vermamma,
omma og langomma okkara

**Hilda Abrahamsen**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til tykkum heimahjálpir
og heimasjúkrasystrar, sum vóru so góðar við hana.
Eisini ein tøkk til tykkum, sum trúliga vitjaðu hana,
meðan hon lá sjúk.
Tøkk til Hera Joensen prest, fyri vøkur orð,
sangarar, berarar og tykkum,
sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri kransar og blómur og til tykkum øll,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kirsten og Steingrím**

# Húsini hjá Frelsunarherinum reist

**Mikudagin sást Merkið veitra á nýggju húsunum, sum Frelsunarherurin letur byggja við høvuðsvegin í Vági**

BYGGING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Mikudagin vórðu nýggju húsini hjá Frelsunarherinum í Vági reist. Myndiner tikin av bryggjuni í Vági og niðan ímóti húsunum, sum standa við høvuðsvegin*

*(Mynd: D. Olsen)*

Stóru og stásiligu húsini, sum Frelsunarherurin letur byggja í Vági, eru nú komin væl ávegis. Mikudagin vórðu húsini reist og Merkið sást veitra.

Tað var um hálvan apríl í ár, at farið varð til verka. Tann 85 ára gamli Fredrik Joensen setti spakan í. Húsini eru mett at kosta omanfyri hálvafjórðu millión krónur. Fígging kemur fyri stóran part frá Frelsunarherinum í Noreg, men eisini fólk og fyritøkur í Føroyum eiga sín part.

### Stór hús

Salur er til eini 250 fólk í húsunum og hædd er eisini tikin fyri, at rørslutarnað skulu hava møguleika at koma innar.

Ymisk rúm eru til ymisk arbeiði og køkur er eisini. Íbúð er ovast til leiðararnar at húsast í. Kjalarin kann nýtast til ymisk endamál.

Húsini eru í tveimum hæddum á 308 fermetrar hvør og so er íbúðin ovast afturat.

Tá arbeiðið fór í gongd var mett, at húsini standa klár í februar komandi ár.

Frelsunarherurin hevur deildir í Havn og í Vági. Í Havn er samkoman sjónligur partur av býarmyndini. Somuleiðis í Vági, har Frelsunarherurin hevur havt hús í mong ár, men við nýggju húsunum gerst Frelsunarherurin sjónligari partur av býarmyndini og starvsmøguleikarnir eru munandi bøttir.







PLATFORM

# Móttøka

Í sambandi við at 25 ár eru liðin, síðani Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri og fyritaksstjóri, varð settur í starv sum blaðmaður á Sosialinum, bjóðar Sosialurin til móttøku í Platformi í Havnar Klubba fríggjadagin 29. august kl 16-18.



Sosialurin